# Kapitalvinningssjálvuppgáva – feløg

TAKS

*Kapitalvinningssjálvuppgávan skal tastast inn á Vinnugugganum, annars telur hon sum óinnlatin.*
*Hetta oyðublað er tí bert ætlað teimum, sum í undantaksføri ikki kunnu nýta Vinnugluggan.*
*Les meira um Vinnugluggan á [www.taks.fo/vinnugluggin](http://www.taks.fo/vinnugluggin).*

Navn

Bústaður

**Sambært løgtingslóg nr. 164** frá 21. desember 2001 (kapitalvinningsskattalógin), sum hevur virknað frá 16. november 2001, gevi eg, undirritaðipersónur, upp eftir bestu sannføring míni, at vinningur/tap míni í árinum, sum sjálvuppgávan er fyri, hava verið hesi.

## Innlatingarfreistin er 1. juli

| | |
|---|---|
| | Ár |
| | V-tal |
| | Ov nógv goldin kapitalvinnings skattur á kontu: |
| 18% | Kapitalvinnings-skattaprosent |
| TAKS<br>Postboks 2151<br>110 Tórshavn | Adressa |
| vinnugluggin.fo | Sjálvgreiðsla |

| | Útgreining av kapitalvinningsinntøku | Upphædd |
|---|---|---|
| K1 | Vinningur av partabrøvum v.m. – *útgreining krevst* | |
| K2 | Vinningur av fíggjarkrøvum og skuld – *útgreining krevst* | |
| K3 | Vinningur av keyps- og sølurættindum | |
| K4 | Vinningsbýti frá føroyskum feløgum – *útgreining krevst* | |
| K5 | Vinningsbýti frá útlendskum feløgum | |
| K6 | Tap av partabrøvum v.m. – *útgreining krevst* | |
| K7 | Tap av fíggjarkrøvum og skuld – *útgreining krevst* | |
| K8 | Tap av keyps- og sølurættindum | |
| K9 | Skattur goldin av vinningsbýti í Føroyum | |
| K10 | Skattur goldin uttanlands | |
| K11 | Kapitalvinningsinntøka áðrenn nýtslu av halli | |

| | Skattskyldug kapitalvinningsinntøka | Upphædd |
|---|---|---|
| K11 | Kapitalvinningsinntøka áðrenn nýtslu av halli *(flutt frá útgreining omanfyri)* | |
| K12 | Brúkt í árinum (framflutt hall) | |
| K13 | Kapitalvinningsinntøka eftir framflyting av halli | |
| K14 | Flutt millum kapitalvinningssjálvuppgávu og partafelagssjálvuppgávu | |
| K15 | Skattskyldug kapitalvinningsinntøka í árinum | |

| | Útgreining av undirskotssaldo | Upphædd |
|---|---|---|
| K16 | Óbrúkt hall primo | |
| K17 | Undirskot í árinum | |
| K18 | Brúkt í árinum – *sí K12* | |
| K19 | Óbrúkt hall ultimo | |

# Kapitalvinningssjálvuppgáva – feløg

| Aðrar upplýsingar | | Upphædd |
|---|---|---|
| K20 | Útlutað vinningsbýti fyri roknskaparárið , íroknað serligt vinningsbýti | |
| K21 | Vinningsbýti viðvíkjandi egnum partabrøvum | |
| K22 | Vinningur/tap við avhending av virðisbrøvum, har onki er útlutað | |
| K23 | Tap við avhending av virðisbrøvum við skattafríum vinningsbýti løgdum afturat | |

**Útgreining av vinningi/tap av partabrøvum**

| Felag | Partabrøv stk. | Útveg. dagf. | Útveg. upphædd | Sølu- dagf. | Sølu- upphædd |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |

**Útgreining av vinningi/tap av fíggjarkrøvum og skuld**

| Skuldari/kravánari | Vinningur/tap av fíggjarkrøvum og skuld |
|---|---|
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |

**Útgreining av vinningbýti frá føroyskum feløgum**

| Felag | Aðalfundardagfesting | Bruttoupphædd | Goldin skattur |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

Mint verður á, at øll skjøl, ið viðvíkja Kapitalvinningssjálvuppgávuni, skulu goymast í 5 ár

..................................................... , tann / 20 ........ ...................................................................................

Staður

Undirskrift og stempul

*(Er einki stempul, skriva fornavn og eftirnavn hjá undirritandi við blokkbókstavum oman fyri undirskriftina)*

**Henda umsókn kann innihalda persónligar upplýsingar, gáa tí um trygdina**

Send umsóknina um álítandi postskipan til taks@taks.fo ella lat okkum hana á annan tryggan hátt.

TAKS, Postboks 2151, 110 Tórshavn, tel. 35 26 00, taks@taks.fo

## Vegleiðing til kapitalvinningssjálvuppgávuna til feløg

Kapitalvinningsskattalógin hevur virknað fyri vinning og tap, sum er staðfest 16. november 2001 ella seinni. Eisini hevur lógin virknað fyri rentuinntøkur, sum eru tilskrivaðar og fyri vinningsbýti, ið er útlutað 16. november 2001 ella seinni.
Hevur skattgjaldarin vinning ella tap av partabrøvum, íløguprógvum og líknandi virðisbrøvum eins og av umbýtiligum lánsbrøvum, har vinningurin ella tapið er staðfest 16. november 2001 ella seinni, men har hesi virðisbrøv eru útvegað áðrenn 16. november 2001, eru serligar skiftisreglur galdandi fyri skatting av vinningi ella tapi. (§§ 27-30)

**Niðanfyri er vegleiðing til, hvussu tey ymisku punktini í kapitalvinningssjálvuppgávuni skulu útfyllast:**

**K1og K6**
Vinningur ella tap av partabrøvum, íløguprógvum og líknandi virðisbrøvum eins og umbýtiligum lánsbrøvum skal roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni jbr. § 4. Um virðisbrøvini verða seld til felagið, sum hevur givið út virðisbrævið, skal avhendingarupphæddin roknast fyri vinningsbýti (skal uppgevast í pkt. K4 ella K5) jbr. § 5, stk. 1. Tó kann Toll- og skattaráðið loyva, at avhendingarupphæddin í staðin verður viðgjørd sum við vanligari sølu, jbr. § 5, stk. 2. Um avhendingin til útgevandi felagið fer fram í tí kalendaraári, tá útgevandi felagið er endaliga avtikið, skal avhendingarupphæddin eisini verða viðgjørd sum við vanligari sølu, jbr. § 5, stk. 3.

**K2 og K7**
Vinningur ella tap av fíggjarkrøvum og skuld skal roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni jbr. § 6. Tap av skuldarum og tap av viðurlagsvinnu verða viðgjørt eftir reglunum í skattalógini, og skulu tí ikki roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni, § 6, stk. 5. Sama er galdandi fyri valutakurstap av fíggjarkrøvum og skuld, ið hava samband við vinnuvirki, § 6, stk. 6. Vinningur ella tap við eftirgeving, fyrning, samanrenning, fyrilokan av skuld og orsakað av neyðskuldarsemju og sjálvbodnari skuldarsemju verða roknað við í uppgerðina av kapitalvinnings-inntøkuni í tann mun, skuldin verður niðurskrivað niður um kursvirðið á kravinum fyri kravánaranum, tá skuldin varð eftirgivin v.m., jbr. § 7. Undantak frá hesum er tó, um eftirgeving v.m. er gáva, arvaforskot ella arvur frá hjúnafelaga, avkomi, foreldrum (heruppií ættleiðingarforeldrum) ella abba og ommu. Tá skal vinningur ikki roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni, jbr, § 7, stk. 2.

**K3 og K8**
Vinningur ella tap av keyps- og sølurættindum til partabrøv, íløguprógv og líknandi virðisbrøv og fíggjarkrøv skal roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni, jbr. § 8.

**K4 og K5**
Vinningsbýti skal upplýsast í uppgerðini av kapitalvinningsinntøkuni, jbr. § 9., men tá hetta er skattafrítt verður tað ikki talt við sum inntøka í samanteljing, sí K11.

**K9**
Her verður uppgivin goldin skattur av vinningsbýti frá føroyskum feløgum. Sambært § 9 í kapitalvinningsskattalógini gjalda feløg, grunnar o.o., sum eru fult skattskyldug í Føroyum, ikki skatt av vinningsbýti. Er talan um at skattur er eftirhildin, verður hetta at upplýsa her, og á hendan hátt verður ein møguligur skattur endurrindaður sjálvvirkandi.

# Kapitalvinningssjálvuppgáva – feløg

**K10**
Her er talan um møguligan skatt, sum er goldin uttanlands av virðisbrøvum, um vinningurin eisini hevur verið skattskyldugur har. Sambært § 19 í kapitalvinningsskattalógini kann skattur, sum er goldin øðrum landi, har tvískattasáttmáli ikki er gjørdur, verða drigin frá í tí skatti, sum skal verða latin í Føroyum av hesi inntøku. Skjalprógv fyri goldna skattin uttanlands skal leggjast við sjálvuppgávuni. Skattur goldin av vinningsbýti frá útlendskum feløgum, er ikki neyðugt at upplýsa, tá hetta er skattafrítt jbr. § 9.

**K11**
Kapitalvinningsinntøka áðrenn nýtslu av halli er ein samantejling av K1, K2, K3, K6, K7 og K8. Vinningsbýti frá føroyskum feløgum og vinningsbýti frá útlendskum feløgum er skattafrítt jbr. § 9, og verður hetta tískil ikki talt við í kapitalvinningsinntøkuna.

**K12**
Hall frá eldri árum kann flytast fram fylgjandi árini, jbr. § 14.

**K14**
Feløg, sum í inntøkuuppgerðini eftir skattalógini hava hall, kunnu draga hallið frá í kapitalvinningsinntøkuni jbr. § 14, stk. 2.

**K15**
Skattskyldug kapitalvinningsinntøka í árinum er endaliga inntøkan eftir at møgulig hall í K12 og K14 eru mótroknað.

**K22**
Her verður upplýst samlaði vinningurin og samlaða tapið av virðisbrøvum, og um eingin avhendan er jbr. § 4, stk. 3, er hetta ein samanteljing av K1, K2, K6 og K7. Sí eisini K23.

**K 23**
Um virðisbræv er avhendað við tapi, kann hetta tap bert dragast frá, í tann mun, tapið er størri enn skattafría vinningsbýtið av avvarðandi virðisbrøvum jbr. § 4, stk. 3. Tapsavmarkingin verður tikin við í útgreiningini av avhendan.